UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **3. mai 2022**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-108**

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-175/2021 frá Annika Olsen, løgtingskvinnu, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum, um Tjóðleikhúsið.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær kann væntast, at spakin verður settur í at byggja tjóðleikhúsið ?
2. Metir landsstýrismaðurin, at játtanin á fíggjarlógini til tjóðleikhúsið er nøktandi?
3. Hvussu nógvur peningur skal setast á íløgujáttanina komandi árini fyri, at tjóðleikhúsið verður veruleiki, og ætlar landsstýrismaðurin at raðfesta tjóðleikhúsið á komandi fíggjarlóg?

Svar

Til 1. Sambært tíðarætlanini verður klárt at bjóða arbeiðið út í seinnu helvt av 2024.

Til 2. Játtanin á fíggjarlógini fyri 2022 røkkur til arkitektakappingina, sum er skrivað út fyri innbodnum. Í ætlanartølunum fyri 2023 og 2024 á fíggjarlógini er peningur settur av til projektering. Hesar játtanir eru ikki nøktandi, og tað verður tí ein partur av fíggjarlógararbeiðinum fyri 2023 at tryggja nøktandi játtan til projektering. Tá arkitektakappingin hevur verið, fæst neyvari vitan um, hvussu nógv skal setast av, men tað er væl meir enn tær upphæddir, ið nú eru settar av, ávikavist 7 og 10 mió. kr.

Til 3. Enn er verkætlanin komin ov stutt til at gera eina meting av, hvat hon kemur at kosta. Staðsetingin er komin upp á pláss, og arkitektakappingin er skrivað út. Tá arkitektakappingin er liðug, er næsta stig at projektera verkætlanina. Tástani verður grundarlag fyri at gera neyvari kostnaðarmetingar og taka støðu til, hvussu nógvur peningur skal játtast á fíggjarlógini. Endaligi kostnaðurin verður tó ikki kendur, fyrr enn verkætlanin hevur verið í útboði, og verklagslóg tá verður løgd fyri Løgtingið.

Eingin ivi skal vera um, at eg sum landsstýrismaður í mentamálum vil gera tað neyðuga fyri, at henda verkætlan skal bera á mál. Tá eg byrjaði sum landsstýrismaður, var tað fyrsta, sum eg gjørdi, at taka málið um staðseting uppaftur til viðgerðar fyri at tryggja bestu loysnina. Endaliga staðsetingin er nú sum kunnugt á Eystaru bryggju, og er Tjóðleikhúsið nú ein týdningarmikil partur av heildarætlanini hjá kommununi fyri økið. Eg gleði meg at síggja úrslitið av arkitektakappingini, og stendur tað til mín, skal verkætlanin fáa neyðugu fíggingina.

Hartil kann eg upplýsa, at samgongan gongur inn fyri, at verkætlanir sum hesar partvís kunnu fíggjast við uttanhýsis fígging. Ætlandi verður verulig ferð eisini sett á hetta arbeiðið eftir arkitektakappingina.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður